# Soltið hjá landsliðs-spælarunum

**Feløgini hjá bæði Óla Johannesen og Øssuri Hansen taptu í vikuskiftinum í næstbestu donsku deildini**

DANMARK
*Jóannes Hansen*

Tað hilnaðist illa hjá Óla Johannesen og Øssuri Hansen í vikuskiftinum.

Heilt út av lagi illa gekst tað hjá Hvidovre, sum leygardagin var í Randers og spældi ímóti liðnum hjá Atla Gregersen.

Hvidovre var aftanfyri 2–0, tá tað var hálvleikt, og Randers Freja vann ikki minni enn 5–0.

Úrslitið ber við sær, at Hvidovre, sum saman við Peter Schmeichel hevur so høgt mál og stórar dreymar, nú er fjórði aftast. Einki hevur verið at hoyrt um tað í donsku pressuni, men tað skuldi ikki undra, um tað skjótt fer at koma upp á tal at siga ábyrgdarmanninum úr starvi. Høvuðsábyrgdina fyri Hvidovre liðnum í næstbestu deildini hevur fyrrverandi yrkisspælarin í Belgia, Jan Sørensen. Hann er stjóri. Venjari er fyrrverandi TB venjarin Frank Skytte.

Øssur Hansen var á liðnum hjá B93 allar 90 minuttirnar, tá teir vóru í Brønshøj. Tað var málleyst inntil tað restaðu seytjan minuttir. So fekk Brønshøj mál. Teir øktu tríggjar minuttir undan leikloki, og í næstsíðsta minutti minkaði B93 um munin.

Øssur Hansen spældi 2. hálvleik, tá B93 mikukvøldið í síðstu viku kom víðari í steypakappingini. Í brotssparkskappingini ímóti Herfølge skoraði Øssur eitt av málunum.

B93 er nú mitt í røðini í 1. deild. Randers Freja er á sætta plássinum. Fríggjakvøldið fær Hvidovre vitjan av Brønshøj, meðan B93 skal spæla á heimavølli ímóti Farum, sum er næstfremst.



Eins og Óli Johannesen mátti Øssur Hansen taka til takkar við tapi um vikuskiftið

# Jákup hevur rættuligan undanvind




*Jákup Mikkelsen og Molde hava havt góðan byrð seinastu umførini, og møguleikin fyri europeiskum fótbólti er nú ikki heilt eingin*

**Føroyski málverjin helt tætt á norska tjóðarleikvøllinum, og nú miðja teir í Molde eftir Europa Cup**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað gongur skjótt upp og niður í fótbólti. Tað hevur stutta tíðarskeiðið hjá Jákupi Mikkelsen í Molde verið góð áminning um. Tá Jákup fyrr í summar kom til Noregs, var nógvur turbulensur í felagnum hjá honum. Fleiri spælarar vóru farnir aðra staðni, tað varð funnist at venjaranum, og leiðslan í Molde stóð eisini fyri skotum.

Tá var Molde umleið í miðjuni í tippuliguni, og dreymurin um altjóða fótbólt tóktist vera ein hvørvisjón.

Eftir at Jákup var komin gekk tað einki serligt nakrar ferðirnar, og eftir at sjey mál vóru farin ígjøgnum í tveimum dystum, gjørdi svenski venjarin, Gunde Bengtson, av, at nú var tíð at seta Jákup á beinkin. Orsøkina segði venjarin vera, at Jákup ikki hevði megnað at vent óhepnu gongdini, sum alt árið hevði verið, at mótstøðumenninir skoraðu eina rúgvu av málum í sambandi við deyðbóltsstøður.

## Vent í holuni

Sunnudagin var Molde á tjóðarleikvøllinum í Oslo. Bæði hjá Molde og hjá Jákupi Mikkelsen er nú aftur púra vent í holuni. Á tjóðarleikvøllinum megnaði Jákup Mikkelsen at halda tætt. Fyri fjórðu ferð á rað vann Molde. Hesa ferð vunnu teir 2–0, og nú eru teir farnir at tosa um bronsukrónurnar og Europa Cup luttøku.

Í fyrsta umfari er Molde komið fram á fjórða plássið, og talan er um stórar avbjóðingar í fýra teimum síðstu umførunum. Komandi vikuskifti verður ikki spælt í tippuliguni, tí tá verður eitt umfar í steypakappingini á skránni.

Annan sunnudag fær Molde vitjan av Lillestrøm, ið er einasta felagið, sum roynir at hanga í toppliðnum Rosenborg. Vikuskiftið eftir dystin ímóti Lillestrøm verður ikki spælt í landskappingini, tí tá verða nógvir EM undankappingardystir á skránni. Eitt nú skulu Jákup Mikkelsen og Føroyar spæla í Slovenia.

Trý tey seinastu vikuskiftini í oktober verður sluttspurturin í Noregi, og tá skulu Molde og Jákup standa sína roynd. Teir skulu spæla á útivølli ímóti Stabæk, á heimavølli ímóti Brann úr Bergen og á útivølli ímóti Viking úr Stavanger.

## Hollur íslendingur

Sunnudagin var leingi talan um einki serligt avrik á Ullevål. Fyrsta tíman sást millum lítið og einki til stórspælið, sum Molde sýndi, tá teir smurdu Odd Greenland av, og Lyn megnaði ikki at seta Jákup Mikkelsen á serligar royndir.

Men so var tað, at Gunde Bengtson gjørdi av at seta nýggja íslendska álopsspælaran á vøllin. Andri Sigthorsson sýndi enn eina ferð, at tað er stórur fongur í honum, og lítil ivi man vera um, at hann verður millum teir fyrstu ellivu, tá Molde skal spæla ímóti Lillestrøm. Á tímaslagnum legði hann upp til leiðslumálið, sum Magne Hoset skoraði, og tá tað restaðu átta minuttir býttu teir báðir um, so tað var íslendingurin, sum skoraði, meðan norðmaðurin legði upp. Magne Hoset varð mettur at vera besti maður á vølli. Norskir fjølmiðlar vita at siga, at fronsk feløg vilja rinda upp til 30 milliónir fyri at fáa unga mannin, sum skoraði fyri sættu ferð á rað, at spæla fyri seg.

## Lítla umrøðu

Luturin hjá málverjanum er ofta lítið takksamur. Tá tað gongst illa, verða øll eygu vend ímóti honum, og tað verður spurt, um hann ikki kundi havt bjargað oftari. Tá tað gongst væl, eru tað teir fremri á vøllinum, sum fáa heiðurin.

Fyri avrikið ímóti Lyn gav stóra dagblaðið VG Jákupi eitt 5 tal. Hetta var sama skoðsmálið, sum tríggir av liðfeløgunum eisini fingu. Tríggir fingu eitt 6 tal, tveir fingu trý, og Magne Hoset varð sagdur at vera besti maður á vøllinum, og tað fekk hann eitt 8 tal fyri.



## Støðan, danska superligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 26 | 3 | 23 | 21 |
| 2 | AaB | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 15 | 10 | 5 | 18 |
| 3 | Esbjerg | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 10 | 13 | -3 | 13 |
| 4 | AB | 8 | 3 | - | 3 | - | 2 | 12 | 9 | 3 | 12 |
| 5 | FCK | 8 | 3 | - | 2 | - | 3 | 10 | 9 | 1 | 11 |
| 6 | Lyngby | 7 | 2 | - | 4 | - | 1 | 8 | 7 | 1 | 10 |
| 7 | FCM | 8 | 2 | - | 4 | - | 2 | 6 | 6 | 0 | 10 |
| 8 | Viborg | 8 | 2 | - | 3 | - | 3 | 9 | 10 | -1 | 9 |
| 9 | Vejle | 8 | 2 | - | 3 | - | 3 | 11 | 15 | -4 | 9 |
| 10 | OB | 8 | 2 | - | 2 | - | 4 | 7 | 12 | -5 | 8 |
| 11 | AGF | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 5 |
| 12 | Silkeborg | 8 | 0 | - | 2 | - | 6 | 3 | 17 | -14 | 2 |

**Føroyskir leikarar:** Todi Jónsson (FCK), Johan Byrial Hansen (OB)

## Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 7 | 6 | - | 1 | - | 0 | 12 | 4 | 8 | 19 |
| 2 | Farum | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 22 | 11 | 11 | 16 |
| 3 | Frem | 7 | 4 | - | 3 | - | 0 | 15 | 7 | 8 | 15 |
| 4 | HFK Sønderj. | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 14 | 9 | 5 | 14 |
| 5 | Randers F. | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 14 | 8 | 6 | 13 |
| 6 | AC Horsens | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 6 | 4 | 2 | 11 |
| 7 | Herfølge | 7 | 2 | - | 4 | - | 1 | 9 | 7 | 2 | 10 |
| 8 | Brønshøj | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 12 | 15 | -3 | 10 |
| 9 | B93 | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 15 | 14 | 1 | 7 |
| 10 | FC Aarhus | 7 | 1 | - | 4 | - | 2 | 11 | 12 | -1 | 7 |
| 11 | B 1913 | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 10 | 13 | -3 | 7 |
| 12 | Skive | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 9 | 12 | -3 | 6 |
| 13 | Hvidovre | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 7 | 13 | -6 | 6 |
| 14 | Fredericia | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 10 | 13 | -3 | 5 |
| 15 | B 1909 | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 6 | 16 | -10 | 5 |
| 16 | Kolding IF | 7 | 0 | - | 1 | - | 6 | 7 | 21 | -14 | 1 |

**Føroyskir leikarar:** Óli Johannesen (Hvidovre), Øssur Hansen (B93), Atli Gregersen (Randers Freja)

## Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 22 | 15 | - | 5 | - | 2 | 62 | 25 | 37 | 50 |
| 2 | Lillestrøm | 21 | 14 | - | 4 | - | 3 | 53 | 26 | 27 | 46 |
| 3 | Viking | 22 | 13 | - | 5 | - | 4 | 39 | 25 | 14 | 44 |
| 4 | Molde | 22 | 12 | - | 4 | - | 6 | 51 | 35 | 16 | 40 |
| 5 | Brann | 22 | 11 | - | 5 | - | 6 | 57 | 36 | 21 | 38 |
| 6 | Stabæk | 22 | 12 | - | 2 | - | 8 | 41 | 36 | 5 | 38 |
| 7 | Odd. Grenl. | 21 | 9 | - | 4 | - | 8 | 37 | 33 | 4 | 31 |
| 8 | Moss | 22 | 8 | - | 2 | - | 12 | 31 | 41 | -10 | 26 |
| 9 | Sogndal | 22 | 7 | - | 4 | - | 11 | 36 | 51 | -15 | 25 |
| 10 | Lyn | 22 | 5 | - | 7 | - | 10 | 35 | 41 | -6 | 22 |
| 11 | Bodø/Glimt | 22 | 4 | - | 8 | - | 10 | 32 | 41 | -9 | 20 |
| 12 | Strømgodset | 22 | 3 | - | 8 | - | 11 | 34 | 62 | -28 | 17 |
| 13 | Tromsø | 22 | 4 | - | 3 | - | 15 | 18 | 43 | -25 | 15 |
| 14 | Bryne | 22 | 4 | - | 3 | - | 15 | 24 | 55 | -31 | 15 |

**Føroyskir leikarar:** Jákup Mikkelsen (Molde)

## Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BV Veendam | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 13 | 6 | 7 | 13 |
| 2 | Excelsoir | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 12 |
| 3 | FC Zwolle | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 9 | 5 | 4 | 12 |
| 4 | RBC Roos'daal | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 10 | 4 | 6 | 10 |
| 5 | ADO Den Haag | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 8 |
| 6 | Cambuur/L. | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 8 |
| 7 | Heracles A. | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 3 | 5 | 6 |
| 8 | Storm/Telstar | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 5 | 3 | 6 |
| 9 | VVV | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 8 | 9 | -1 | 6 |
| 10 | G.A. Eagles | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 10 | 8 | 2 | 5 |
| 11 | Emmen | 3 | 1 | - | 1 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 4 |
| 12 | Haarlem | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 7 | -2 | 4 |
| 13 | Dordrecht '90 | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 8 | 11 | -3 | 4 |
| 14 | Volendam | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 15 | Top/Oss | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 14 | -10 | 4 |
| 16 | Helmond Sp. | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 1 | 8 | -7 | 2 |
| 17 | Eindhoven | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 3 | 11 | -8 | 2 |
| 18 | MVV | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 4 | 10 | -6 | 1 |

**Føroyskir leikarar:** Súni Olsen (FC Zwolle)

## Støðan, enska 3. deild

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rochdale | 7 | 5 | - | 2 | - | 0 | 13 | 6 | 7 | 17 |
| 2 | Mansfield | 7 | 4 | - | 3 | - | 0 | 13 | 6 | 7 | 15 |
| 3 | Luton | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 13 | 8 | 5 | 14 |
| 4 | Leyton O. | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 14 |
| 5 | Shrewsbury | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 9 | 8 | 1 | 13 |
| 6 | Bristol R. | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 8 | 7 | 1 | 13 |
| 7 | Hull | 6 | 3 | - | 3 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 12 |
| 8 | Darlington | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 9 | 7 | 2 | 11 |
| 9 | Plymouth | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 11 |
| 10 | Southend | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 7 | 5 | 2 | 11 |
| 11 | York | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 9 | 11 | -2 | 9 |
| 12 | Scunthorpe | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 12 | 10 | 2 | 8 |
| 13 | Oxford Utd. | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 9 | 9 | 0 | 8 |
| 14 | Swansea | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 10 | 13 | -3 | 8 |
| 15 | Halifax | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 6 | 9 | -3 | 8 |
| 16 | Kidderm. | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 4 | 7 | -3 | 8 |
| 17 | Torquay | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 6 | 10 | -4 | 7 |
| 18 | Macclesfield | 7 | 1 | - | 4 | - | 2 | 6 | 11 | -5 | 7 |
| 19 | Lincoln C. | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 7 | 7 | 0 | 6 |
| 20 | Cheltenham | 7 | 1 | - | 3 | - | 3 | 11 | 12 | -1 | 6 |
| 21 | Hartlepool | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 5 | 7 | -2 | 5 |
| 22 | R&D | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 6 | 9 | -3 | 5 |
| 23 | Exeter | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 9 | 18 | -9 | 5 |
| 24 | Carlisle | 7 | 0 | - | 3 | - | 4 | 4 | 10 | -6 | 3 |

**Føroyskir leikarar:** Julian Johnsson (Hull City)

# Gullkvinnurnar spæla

Týskvøldið kunnu klaksvíkingar uppliva nýkosnu føroyameistararnar í kvinnufótbólti.

Fyri eini góðari viku síðani endurvunnu kvinnurnar hjá KÍ føroyameistaraskapin, og hóast KÍ hevur tveir dystir eftir at spæla, kann eingin fáa tær aftur.

Týskvøldið klokkan 18.00 spæla KÍ-kvinnurnar útsettan dyst ímóti B68 í Klaksvík. Komandi leygardag verður seinasti dysturin á árinum, tá HB kemur á vitjan í Klaksvík.

***-ek***




*Gull vinnararnir úr Klaksvík spæla týsdagin útsettta dystin móti B68*

# Málleyst í Onglandi

Hull City, sum enn eigur fyrsta tapið í ensku triðju deild til góðar hetta kappingarárið, leikti málleysan javnleik móti Macclesfield um vikuskiftið.

Á heimasíðuni hjá Hull City verður sagt, at Julian og liðfelagarnir høvdu bóltin nógv tað mesta av tíðini, men at tað kortini gekk sera striltið við at skapa nakrar veruligar málmøguleikar.

Hull er í løtuni á sjeynda plássinum í deildini, men teir hava leikt ein dyst færri enn flestu av hinum liðunum. Gevur hesin ein sigur, vinnur liðið seg upp á næst fremsta plássið.

***-jm***

# Zwolle tapti

Eftir at føroyska felagið í Hollandi, FC Zwolle, hevur fingið eina flúgvandi byrjan upp á kappingarárið, komu Súni Olsen og teir veruliga niður aftur á jørðina um vikuskiftið.

Súni var tó ikki á liðnum, sum á útivølli royndi seg móti VVV. Úrslitið var einki at reypa av, tí Zwolle tapti dystin 2-0 eftir 1-0 í hálvleikinum. VVV skoraði miðskeiðis í fyrra hálvleiki, og tá Zwolle nakað seinni fekk ein mann riknan av vølli, fór tað alla tíðina at verða torført hjá Zwolle.

***-jm***